# Vinnulív fram um politikk

**Schumann Hjaltalin fylgir somu forskrift sum Jákup Suni Joensen og velur vinnulív fram um politikk**

KOMMUNAL-POLITIKKUR

*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Schumann Hjaltalin vil heldur vera vinnulívsmaður enn politikari*

Eftir tólv ár við føstum plássi til býráðsfundir í Havn hevur Schumann Hjaltalin valt at gevast sum býráðspolitikari. Hann er tríggjar tær seinastu ferðirnar valdur á listanum hjá Sambandsflokkinum, men hann verður ikki á valevnalistanum í heyst.

– Eg meini, at tá tú hevur sitið í tólv ár, so er tíðin komin til at víkja fyri øðrum, sigur Schumann Hjaltalin.

Ì Sosialinum í gjár stóð at lesa um Jákup Suna Joensen, sum heldur við vera vinnulívsmaður enn politikari. Orðingarnar frá blaðnum í gjár kunnu léttliga endurnýtast í dag. Schumann velur vinnulív fram um politikk.

– Tað er rættiliga trupult bæði at vera vinnulívsmaður og býráðspolitikari. Samstundis er tað eisini ein spurningur um lyndi. Í vinnulívinum er stutt frá umsiting til handling, sigur Schumanna Hjaltalin.

Fyri kortum var eitt mál frammi, sum snúði seg um, at Handiskjarnin hevði fingið ordran upp á nakrar barnavognar frá kommununi. Og tað er millum annað sovorðnum málum, ið Schumann vil sleppa undan.

– Hatta málið er ikki orsøkin til, at eg gevist. Men tað hendir ofta, at tað kann tykist sum um, at tingini verða blandaði saman, hóast tað ikki er so, sigur Schumann Hjaltalin.

Til dagligt er Schumann stjóri fyri Handilskjarnan, og her ætlar hann at halda fram. Hann hevði ætlar sær úr býráðnum longu fyri fýra árum síðani, men hann valdu tó at halda fram, tá tvey umboðunum tá ikki stillaðu uppaftur.

Schumann Hjaltalin hevur verið limur í teknisku nevnd hjá býráðnum øll árini, og hann hevur millum annað eisini verið í fíggjarnevndini í hesum valskeiðinum.

Hóast hann velur at gevast, so eggjar hann øðrum vinnulívsfólki til at stilla upp.

– Tað hevur týdning at hava eina góða blanding av fólki í býráðnum, sigur Schumann.

### Eitt upplivilsi

Hesi tólv árini í Tórshavnar býráði kallar Schumanna Hjaltalin fyri eitt upplivilsi, hann ikki fer at gloyma í bræði. Tíðin hevur verið sera spennandi og lærurík, heldur hann.

– Eg varð í 1992, tá var ringasta krepputíð í Føroyum, og Tórshavnar kommuna stríddist við einari stórari skuld. Nú er lítil og eingin skuld, og kommunan kann at kalla bjóða trygd fyri, at fólk fáa síni børn ansaði. Tað er ein ómetaliga stór broyting, sum Schumann Hjaltalin.

Hann sigur seg rokna við, at valstríðið hesaferð fer mest at snúgva seg um eldraøki, sum mestur verður knýtt enn tættari at føroysku kommununum.

– Eg vóni, at verandi samstarv í meirilutanum fer at halda fram. Tað hevur riggað væl, og eg haldi, vit hava fingið nógv burturúr, sigur Schumann.

### Toppskoraði

Ì blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Jákup Suni Joensen var toppskoraði við seinasta býráðsval. Hann var sjálvandi ikki toppskoraði millum øll valevnini, men bert á Fólkaflokslistanum, sum tað eisini stóð at lesa í greinini.

Fyri at eingin misskiljing skal vera, so var tað Heðin Mortensen, ið gjørdist fremstur av øllum við 630 atkvøðum á seinasta býráðsvali í Havn.


# HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu



Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____
Bústaður: ____
Postnr.: ____
Bygd/býur: ____
Telefon nr.: ____
Undirskrift: ____

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO




# Lív á Setrinum

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 23. juli fáa 5 lívfrøðingar handað prógv á Fróðskaparsetrinum.

Prógvhandanin verður kl. 15.00 á Náttúruvísindadeildini í Ovastovu úti í Nóatúni.

Prógvhandanin er endin á einari 3 ára bachelor útbúgving, sum byrjaði á heystið 2001. Hesi 3 árini hava næmingarnir lært um livandi verur, um náttúruna og náttúruviðurskifti. Serligur dentur hevur verið lagdur á at viðgera tað, sum hevur við Føroyar og føroysk viðurskifti at gera.

Útbúgvingin endaði við einari verkætlan, sum næmingarnir sjálvir hav valt sær. Tríggjar verkætlanir vórðu gjørdar á hesum sinni. Tær eru í stuttum viðgjørdar niðanfyri.

Vilt tú vita meira, kanst tú seta teg í samband við Eyðfinn Magnussen Tel 35 25 59 (beinleiðis) ella 35 25 50 (umstilling). Eisini ber til at senda teldupost á: EydfinnM@Setur.fo

### Gágga fiskar meira tosk, meðan høggu-slokkurin er betur til hýsu



Jack Hummeland Jacobsen og John Joensen hava kannað hvat agn fiskar best á línu og hvussu agnið ávirkar støddina á fiskinum, sum verður fingin. Kanningarnar hjá teimum báðum vístu, at gágga fiskar meira tosk enn høgguslokkur, meðan høggu-slokkurin er betur til hýsu. Eisini vístu kanningarnar, at fiskurin, sum verður fingin við gággu, er størri enn tann, ið verður fiskaður við høgguslokki.

### Hvussu kunnu smoltstøðirnar fyribyrgja, at soppur ger enda á rognunum



Sølvi Espeland og Petra E. Hansen kannaðu hvussu smoltstøðir kunnu fyribyrgja, at soppur ger enda á rognunum. Soppavøkstur á rognum er ein vanligt fyribrigdi á smoltstøðum. Trupulleikin hevur higartil verið loystur við at rognini verða viðgjørd við tí kemisk evninum Malakittgrønt, men at hetta evnið er undir mistanka, at verða krabbameinselvandi, er forboð sett móti, at tað verður nýtt í matframleiðslu. Í sínum kanningunum hava Sølvi og Petra kannað ymisk onnur evnir, sum í staðin kunnu verða nýtt at fyribyrgja soppavøkstri á rognum hjá ælabogasílum. Úrslitini vístu, at evnið Pyceze gav tað besta úrslitið.

### Glýsufiskurin á Føroyabanka



Marita Debess Magnussen hevur skrivað um lívfrøðina hjá glýsufiskinum á Føroyabanka. Glýsufiskurin er ein lítil fiskur, einar 15-20 cm til longdar, sum við Føroyar bert er at finna á Føroyabanka. Í uppgávuni hevur Marita kannað útbreiðslumynstrið hjá glýsufiskinum á bankanum, hvussu hann veksur, nær hann gerst kynsbúgvin og føðina hjá glýsufiskinum.

Meira kann lesast um uppgávurnar á internetinum: www.sleipnir.fo/setur/nvd/bs_uppg/BS-verkaetl.html




**Til sølu**

Volvo 144 sedan. Árgangur nov. 1971. Koyrt 87.800 km. Bilurin er í góðum standi. Høvuðsumvældur í 1994. Hevur bert havt tveir eigarar. Til sølu um hóskandi boð fæst

**Tel. 314018 / 213727**



**Til sølu**

Toyota Corolla T Sport. Árgangur juli 2002. 192 HK og 6 gear. Koyrt 31.000 km

**Tel. 514716**

WWW.SMYRIL-LINE.COM



Á túrunum spæla m.a. »Spaðar 5«, »Tey av Kamarinum«, »Showmenn« og »Havkallar«

super AUGUST TILBOÐ

DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANLAND Í BLOKHUS & HIRTSHALS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.950,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANCENTER-SUMMARHÚS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.780,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 9.400,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.890,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Stefan Ujvari (NO) og Göran Berndsson (SE) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.980,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo